## Nenad til Víking

Fyrrakvøldið stóð greitt, at Nenad Stankovic ikki heldur fram hjá B68, og longu í gjár varð navn sett á nýggja felag hansara. Víkingur kundi nevnliga staðfesta, at tað verður har, at spælarin fer at spæla fótbólt í 2010, og við hesum hevur felagsliðið í Eystur kommunu tryggjað sær ein av bestu miðvallarunum í landinum. Nenad Stankovic hevur í Føroyum spælt við Skála, NSÍ og B68. Við NSÍ var hann í 2007 við til at vinna FM-heitið, eins og hann sama ár varð kosin at vera ársins spælari í føroyskum fótbólti.



## Bassene og Stojkovic halda fram í TB

TB hevur gjørt avtalu við miðvallaran Joseph Bassene og málverjan Ivan Stojkovic um at spæla við besta liðinum hjá felagnum komandi ár. Tað skrivar Suðuroyarportalurin.Á spælarafundi í felagnum varð eisini greitt, at teir, sum vóru við í hópinum til teir seinastu dystirnar í ár, eisini vera í hópinum hjá Tvøroyrar Bóltfelag komandi kappingarár. Eisini teir dreingir av Tvøroyri, sum í ár gjørdust meistarar við felagsliðnum úr Suðuroynni, hava boðað frá, at teir ynskja at leika við TB næsta ár.

# Alt er opið

**Venjingarnar hava ikki givið nakra greiða ábending um, hvussu Kerr ætlar at seta liðið í morgin. Somuleiðis er ógreitt, um Súni Olsen kann spæla**




Rólant Waag Dam

**Tréguier, Frankaríki:** Brian Kerr, landsliðsvenjari, fer at blanda kortini nógv og væl, áðrenn hann setir liðið til í morgin.

Undir venjing hevur hann eisini blandað liðini nógv og væl, soleiðis at tað út frá tí ikki ber til at gita, hvør byrjar inni og hvør als ikki sleppur upp í part.

Tá tað kemur til at meta um liðið, verður uppgávan ikki lættari av, at bæði Súni Olsen og Andreas Lava Olsen noyddust at gevast við at venja í gjár.

Nøkur nøvn tykjast tó meiri upplagd enn onnur at byrja inni. Jákup Mikkelsen fer sjálvsagt í mál. Fróði Benjaminsen, Atli Danielsen, Bogi Løkin, Atli Gregersen og Johan Troest Davidsen kunnu næstan vera fullvísir í, at teir eisini byrja inni. Tað sama er galdandi fyri Súna Olsen, um hann altso er klárur. Og so er tað Bartal Eliasen, sum eftir at vera partur av miðverjuni í sigrinum seinast, helst eisini kemur at byrja inni.



Jákup á Borg, Christian Lamhauge Holst, Símun Samuelsen og Einar Hansen eru allir leikbannaðir, og tað hevur fleiri broytingar við sær á liðnum í mun til seinast

Mynd: Rólant Waag Dam

### Gitingar

Spurningurin er so, hvussu er við restini. Jónas Þór Næs vildi verið upplagdur til høgra bakk, men hann sat á bonkinum seinasta dyst, og undir venjing í gjár spældi Atli Danielsen á hesum plássi eina løtu. Tí er hann eitt boð til hetta pláss, sum hann eisini hevur røkt áður.

Spennandi verður eisini at vita, hvønn Kerr velur til fremstu plássini. Fyri Símun Samuelsen tykist mest upplagda boðið at vera, at flyta Boga Løkin yvir í vinstra borð og so koyra Andreas Lava Olsen í høgra.

Andy Olsen kundi komið beint inn á plássið hjá Símun Samuelsen, men ivasamt er, um venjarin er sinnaður at seta ein púra feskan mann at spæla yvirav Henry og Sagna.

Til fremstu plássini er upplagt, at Rógvi Jacobsen og Arnbjørn Hansen taka sær av hesum. Arnbjørn fremst og Rógvi sum eitt slag av millumlið millum miðvøll og álop.

### Liðið

Men við teimum fyrivarnum, sum skulu takast – og at Súni Olsen verður klárur – meta vit, at eitt gott boð upp á eina føroyska byrjunaruppstilling er hetta:

Jákup Mikkelsen – Atli Danielsen, Atli Gregersen, Bartal Eliasen, Johan Troest Davidsen – Andreas Lava Olsen, Súni Olsen, Fróði Benjaminsen, Bogi Løkin – Rógvi Jacobsen – Arnbjørn Hansen.

# Franska liðið er sett

**Enn er tað ikki váttað alment nakrastaðni, men franskir fjølmiðlar vilja vera við, at Raymond Domenech hevur sett liðið til leygardagin, og at Benzema byrjar á bonkinum**




Rólant Waag Dam

**Tréguier, Frankaríki:** Mandanda – Sagna, Gallas, Abidal, Evra – Govou, Toulalan, Diarra, Henry – Gignac, Anelka. Soleiðis sær franska landsliðið út, sum fer á vøllin at dystast við føroyska landsliðið leygarkvøldið. Tað siga franskir fjølmiðlar, hóast liðið ikki alment er endaliga sett, fyrr enn eina tíma undan dystarbyrjan.

Tað merkir, at Real Madrid-leikarin Karim Benzema ikki byrjar inni.

### Føroyar eitt lítið land

Ein teirra, sum heldur ikki kemur at byrja inni, er franski verjuleikarin í Arsenal, Gael Clichy. Við goal.com sigur hann, at franska liðið má halda fokus.

– Føroyar er eitt lítið lið, og við teimum leikarunum vit hava, skulu vit bara gera okkara arbeiði so einfalt sum gjørligt. Men vit mugu minnast, at í august vunnu vit bara 0-1, so tað verður framvegis trupult hjá okkum, sigur Clichy, sum heitir á sínar liðfelagar um at vera varnar.

Millum hesar liðfelagar plagar Ribery at vera, og tað sama við Gourcuff. Hesir eru báðir skaddir og tískil ikki klárir leygarkvøldið. Hinvegin telur liðið menn, sum dagliga spæla í Barcelona, Manchester United, Chelsea og Arsenal. Stjørnur vanta franskmonnum ikki.



Alt bendir á, at Karem Benzema úr Real Madrid byrjar á beinkinum,